# ítróttur

Nr. 69 • mikudagur • 13. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# KÍ og B36 eru úti



*B36 og KÍ eru liðug í steypakappingini. Hóast deyðakvirt var um málið undan evstamarki okkara, so er tað við vissu niðurstøðan, sum Starvsnevndin hjá FSF kom til á fundi mánakvøldið*

**Starvsnevndin helt seg til praksis hjá UEFA, tá hon á fundi mánakvøldið tók avgerð um at senda Fram og Skála víðari í kappingini um Løgmanssteypið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var drúgt fundarvirkemi í bygninginum hjá FSF við Tórsvøll mánakvøldið. Á skránni var fyrst og fremst málið um spæliloyvini – ella mangul upp á sama - hjá KÍ og B36, tá hesi nýttu ikki skrásettar spælarar í dystunum móti ávíkavist Fram og Skála.

Málið um spæliloyvini hevur verið eitt av heitu politisku eplunum í enn unga kappingarárinum, og sum skilst, so tók tað eisini drúgva nevndarviðgerð, áðrenn endaligur dómur varð avsagdur. 18.30 fór starvsnevndin á fund, og klokkan var farin at nærkast 22, áðrenn ljósini vórðu sløkt í FSF-bygninginum. Sum skilst, so var ætlanin, at onnur mál skuldu viðgerast, men málið um spæliloyvini hjá B36 og KÍ fór við at kalla allari tíðini á fundinum.

### Dømd at tapa

Og tá var niðurstøðan greið. Tað bar okkum ikki til at fáa váttað úrskurðin hjá Fótbóltssambandinum í málinum, men eftir øllum sólarmerkjum at døma, eru KÍ og B36 liðug í kappingini um løgmanssteypið.

Við hesum hevur FSF altso valt ikki at broyta siðvenjuna, sum hevur verið viðvíkjandi spæliloyvum, eins og úrskurðurin er í tráð við vanligan praksis hjá UEFA.

Her segði pressutalsmaðurin, Frits Ahlstrøm alt fyri eitt, at eitt líknandi mál í UEFA treytaleyst hevði verið dømt á tann hátt, at felagið við ikki-skrásettu leikarunum varð dømt at tapa dystin.

Spurningurin hevur tó samstundis verið, um ein slíkur úrskurður fer at leggja ov stórt trýst á umsitingina hjá ymsu feløgunum. Eina umsiting, sum í stóran part byggir á sjálvboðið ella partvíst lønt arbeiði.

Tey atlitini hava so ikki vunnið frama, og ivaleyst hevur trupla umsitingin av eini slíkari loysn eisini vigað nógv. Sum nevnt í grein fyri góðari viku síðani, so hevði hetta helst eisini útloyst eina »elastik-effekt«, sum kundi verið sera trupul at umsiti. Tí hvussu vigar tú, nær talan er um mistak ella um tilætlað brot á reglurnar.

### Eingin viðmerking frá nevndini

Tað er eingin loyna, at formaðurin í kappingarnevndini, Bjarki Mohr, helst sá, at feløgini sluppu við skrekkinum, at kalla. Hetta skilt soleiðis, at feløgini vórðu revsað umsitingarliga, heldur enn at tey skuldu dømast at tapa sínar dystir.

Tað tykist altso ikki, sum hava sjónarmiðini hjá formanninum vunnið frama, men sjálvur vildi Bjarki Mohr ikki gera viðmerkingar til málið, áðrenn evstamark okkara.

- Eg kann bara vátta, at vit hava gjørt ein úrskurð í málinum á fundi mánakvøldið, eftir at málið varð lýst væl og sakligt. Eg fari tó ikki at siga nakað um úrskurðin, ella í aðrar mátar at úttala meg í fjølmiðlunum um hetta, fyrr enn innblandaðu partarnir eru kunnaðir, er einasta viðmerkingin, frá formanninum.

### FAKTA

Heðin á Lakjuni, Høgni Madsen og Hjalgrím Elttør vóru á vøllinum, tá KÍ vann 7-1 á Fram í kappingini um Løgmanssteypið. Spæliloyvi teirra lógu tá framvegis hjá ávíkavist HB, ÍF og Fremad Amager. Heldur ikki var spæliloyvi hjá KÍ-málverjanum, Karstin Joensen, tá komið í rættlag, men hann var skaddur og tók tí ikki lut í dystinum.

Hjá B36 varð Eyðun Højgaard skiftur inn, tá teir vunnu 4-2 á Skála. Spæliloyvið hjá Eyðuni var tá framvegis hjá ÍF Føroyar, har hann hevur spælt í tíðarskeiðnum, sum hann var í Danmark.

## Starvsnevndin tók avgerðina

Vanliga liggja avgerðir um mál, sum viðvíkja lands- og steypakapping hjá kappingarnevndini í FSF, men í hesum førinum var tað ikki hon, sum tók avgerðina.

Fyri at fáa eina betri javnvág millum talið av limum í starvsnevndini og ymsu undirnevndunum, hevur FSF í vár minkað um talið av nevndarlimum í eitt nú kappingarnevndini, soleiðis at hendan nú telur tríggjar limir og ikki fimm sum áður. Ein av hesum er Rúni Heinesen, og sum klaksvíkingur helt hann ikki, at hann skuldi taka lut í viðgerðini av málinum. Hetta saman við prinsipiella týdninginum, sum málið hevur fyri framtíðar avgerðir, fekk Kappingarnevndina at taka avgerð um, at málið heldur skuldi viðgerast av starvsnevndini.

Formliga varð hetta gjørt á fundi hjá kappingarnevndini mánakvøldið, og klokkan hálvgum sjey fór starvsnevndin á fund.

**-jm**

## Verður helst kært

Sum tað framgongur á síðuni, so vóru hvørki B36 ella KÍ ikki kunnað um úrskurðin hjá starvsnevndini áðrenn evstamark okkara, og tí var tað ikki stórvegis, sum tað bar til at fáa av viðmerkingum til málið frá feløgunum.

Spurdir beinleiðis, hvørt tey fara at kæra, um úrskurðurin hjá nevndini gongur teimum ímóti, svara bæði KÍ- og B36-formaðurin, at tað fara tey helst.

- Eg trúgvi ikki, at vit fáa gjørt annað enn at kæra málið, um tað verður úrskurðurin. Tað eru vit noyddir til, segði Gestur Hovgaard, formaður í KÍ.

Og B36-formaðurin, Kjartan Mohr, er ikki ósamdur.

- Tað hava vit í øllum førum hugsað um, og tað er so ein ógvuliga sannlíka reaktión. Enn hava vit tó ikki fingið úrskurðin, men nevndin fer helst at viðgera málið, so skjótt vit hava hendan. Eg kann bara staðfesta, at um so er, so haldi eg kappingina liggja í skeljasori, longu áðrenn hon er byrjað, staðfestir Kjartan Mohr.

**-jm**

## Royn fekk ikki viðhald

Umframt drúgva málið um spæliloyvini hjá KÍ og B36, var eisini eitt annað mál á skránni.

Royn hevði kært nýtsluna hja B71 av Kristoffur Vidtfeldt, tá liðini bæði hittust í kappingini um FSF-steypið.

Tann dystin vann B71 4-0, men við støðuni 3-0 varð Kristoffur Vidtfeldt skiftur inn, hóast navn hansara ikki stóð á dómaraseðlinum.

Eftir hendingina á sinni, tá HB misti meistaraheitið, tí feilur var í dómaraseðlinum, eru reglurnar hesum viðvíkjandi broyttar, og tá siðvenjuna valdi Kappingarnevndin at halda fast um.

Úrskurðurin staðfesti, at tá talan er um eitt mistak í útfyllingini av dómaraseðlinum, og tá talan var um leikara, sum var lógliga skrásettur, verður B71 ikki revsað fyri hetta.

**-jm**